umhvørvisstovan

ELFELAGIÐ SEV
LANDAVEGUR 92
POSTBOX 319
110 TÓRSHAVN
Føroyar

Argir hin 22. november 2019
Málsnr.: 19/00603-21
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Ingvard Fjallstein

**Viðvíkjandi: Undantak til umhvørvisgóðkenning av sólorkustøð**

SEV spurdi hin 19. november 2019 um royndarverkætlanin at framleiða ravmagn við sólorkuverkinum á fótbóltsvøllinum í Sumba skal hava umhvørvisgóðkenning.

Sambært § 26 í lóg um umhvørvisvernd skal ikki farast undir fyritøkur, virkir ella útbúnaðir, ið eru at finna í fylgiskjalinum til lógina, uttan at góðkenning er givin til tess.

Men sambært §26, 3. stk. kunnu fyritøkur, virkir ella útbúnaðir, sum í fylgiskjalinum eru merkt við eini stjørnu, verða undantikin skylduni til góðkenning, um Umhvørvisstovan metir, at tann dálking, ið virkið, fyritøkan ella útbúnaðurin vil kunna elva, hevur minni týdning fyri umhvørvið.

Orku- og hitaframsleiðsla eru í bólki H í fylgiskjalinum til lógina. Orkuverk og hitaframleiðandi virkir eru merkt við stjørnu (*). Í donsku lógini, sum er fyrimynd fyri føroysku, verður hetta útgreinað nærri. Har er talan um størri kraftverk og hitaverk (kol, olja, gass), sum hava stórt útlát í sambandi við raksturin. Føroyska lógarfyrimyndin er frá áttatiárunum, men sólorkuverk eru heldur ikki nevnd í kunngerð til galdandi donsku lógina um umhvørvisvernd.

Umhvørvisstovan hevur viðgjørt og góðkent umhvørvisárinsmeting av sólorkuverkinum í Sumba (Mál. nr. 19/00603-9). Í teirri viðgerðini kom ikki fram, at sólorkustøðin fór at hava dálkandi útlát av týdningi fyri umhvørvið. Harafturat er talan um eina tíðaravmarkaða verkætlan upp á tvey ár.

Umhvørvisstovan metir tí, at dálkingin, sum raksturin av sólorkustøðini fer at hava við sær, ikki fer at hava týðandi dálking við sær.

**Avgerð**

Umhvørvisstovan metir tí ikki, at SEV skal søkja um umhvørvisgóðkenning av sólorkustøðini á fótbótsvøllinum í Sumba.

Um nýggir og umhvørvistýðandi upplýsingar seinni koma fram, treytar Umhvørvisstovan sær rætt til at taka omanfyri standandi avgerð til nýggja viðgerð.

**Kæra**

Henda avgerð kann kærast til landsstýrismannin við innlendismálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendir kæruna til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakunngjørd. Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 20. desember 2019.

Ingvard Fjallstein, málsviðgeri / Suni Petersen, deildarleiðari